fj



# FULLTRÚI TIL UTTANRÍKISTÆNASTUNA

**Starvið**
Søkt verður eftir fulltrúa til fast starv í Uttanríkistænastuni.

**Førleikakrøv**
Kravt verður, at umsøkjari hevur:

Útbúgving frá hægri lærustovni innan løgfrøði, diplomati, stjórnmálafrøði, búskaparfrøði ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umráðandi er, at tann, ið settur verður:

- hevur góð samstarvsevni,
- hevur góð sundurgreiningarevni,
- hevur góðar samskiftisførleikar í føroyskum og enskum, bæði munnliga og skrivliga,
- hevur politiskt tev,
- er tænastuhugaður, fleksibul og miðvísur,
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Umsøkjarar skulu eisini hava diplomatiskan sans, hava evni til at hugsa strategiskt og samskifta á ymiskum stigum. Tað er fyrimunur, at umsøkjarar hava innlit í almennu fyrisitingina og uttanríkisøkið.

**Løn og setanartreytir**
Talan er um fulltíðarstarv, ið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanarøkið fevnir um øll stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir teirra. Roknast kann við, at arbeiðstíðin stundum fellur uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Nærri kunning um starvið**
Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Gunnar Holm-Jacobsen, stjóra fyri Uttanríkistænastuna, á tel. 556106 at fáa nærri upplýsingar.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívsrensli o.ø. skulu sendast til:

Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
Postrúm 3279
110 Tórshavn
Ella við teldupost til ummr@ummr.fo

Umsóknir skulu vera Uttanríkis- og mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin **11. oktober 2021 kl. 12.00**.

Starvið verður sett frá 1. desember ella skjótast til ber. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

*__Uttanríkistænastan,__ ið bygnaðarliga er partur av __Uttanríkis- og mentamálaráðnum,__ røkir og samskipar uttanríkispolitiska arbeiði landsstýrisins.*
*Arbeiðsøkið fevnir um millumlandasamstarv, heruppií handilsviðurskifti, trygdarmál, havtilfeingi, økisbundið samstarv, heruppií norðurlendska og arktiska samstarvið, altjóðarætt, tjóðar-branding, menningarsamstarv, neyðhjálp, útflutningsframa, protokoll,og konsularviðurskifti.*
*Sendistovurnar í Brússel, London, Reykjavík, Keypmannahavn, Moskva, Beijing og Tel Aviv eru partur av Uttanríkistænastuni. Sí heimasíðu Uttanríkis- og mentamálaráðsins www.ummr.fo*